

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 09 - 2012

# Oljustjórar í Løkshøll

Týskvøldið 25. september klokkan 19 verður almennur íleggjarafundur í Løkshøll í Runavík, har stjórarnir í teimum fimm listaðu føroysku fyritøkunum í Føroyum fara greiða frá halvarsúrslitunum fyri 2012, og har høvi eisini verður at fregnast um framtíðarútlit og ætlanir hjá fyritøkunum. Millum fyritøkurnar eru tey bæði føroysku oljufeløgini, Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum. Har fara stjórarnir, Ben Arabo og Nils Sørensen at greiða frá. Hinar tríggjar fyritøkurnar eru Atlantic Airways, BankNordik og Bakkafrost. Har fara Magni Arge, Janus Petersen og Regin Jacobsen at leggja fram. Tað er Virðisbrævamarknaður Føroya, sum stendur fyri tiltakinum, sum er ókeypis og alment. Hetta verður fyrstu ferð, at slíkur fundur verður hildin í Løkshøll. Seinast varð fundurin í Fabrikkini hjá Østrøm í Havn. Mynd Janus Petersen, BankNordik, Nils Sørensen, Faroe Petroleum, Regin Jacobsen, Bakkafrost og Ben Arabo, Atlantic Petroleum. Umframt hesar fer eisini Magni Arge, frá Atlantic Airways at vera við í Løkshøll í annaðkvøld.